## Brúkiligt fiskarí

Tað hevur viðrað sera, síðani Atlantic Navigator fór nýggjan túr herfyri. Teir hava roynt einar 40 fjórðingar í ein landnyrðing úr Fugloynni saman við hinum føroysku skipunum, og fiskiskapurin hevur verið hampiligur. Í gjár hevði Atlantic Navigator 400 tons av surimi og 100 tons av mjøli inni eftir at hava fiskað í tólv dagar. Tað vánaliga veðrið darvar fiskiskapinum, tí tað vísir seg, at svartkjafturin spjaðir seg, tá illveður er.

## Nýggjur stjóri

Dátueftirlitið fær nýggjan stjóra á nýggjárinum. Innlendismálaráðið setti í gjár Ingunn Eiriksdóttir í starvið. Ingunn er útbúgvin løgfrøðingur. Síðani 2000 hevur hon arbeitt sum fulltrúi í miðfyrisitingini, og síðani 2004 hevur hon arbeitt í innlendismálaráðnum við m. a. persónsupplýsingarlógini sum ábyrgdarøki, eins og hon regluliga hevur undirvíst í somu lóg og dátutrygd. Ingunn Eiriksdóttir tekur við stjórastarvinum 1. januar.



*Kjakpanelið týskvøldið var mannað við seks ymiskum umboðum. Teirra millum var Hanus Joensen, og hann yngsti meiri lit á gráu økini*

# Meiri litur skal setast á gráu økini

**Ov nógvir spurningar detta ósvaraðir niður ímillum, tá ið ivi stingur seg upp um, hvør eigur ábyrgdina av teimum**

SKÚLAFUNDUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað eru ov nógv ivamál í sambandi við skipanina av fólkaskúlanum, og tað ávirkar arbeiðið og úrslitið.

Hanus Joensen, skúlastjóri í Kommunuskúlanum í Havn, vísti í Miðlahúsinum á, at gráu økini eru mong:

– Alt ov ofta verður spurt og ivast í, um tað nú er Mentamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Almannastovan ella kommununar, sum eiga ábyrgdina, og um tað er ein ella fleiri ella kanska allir hesir partarnir, sum skulu játta pengar.

Ivamálini bera við sær, at ofta detta spurningar ósvaraðir niður ímillum, og tað er spell. Ikki minst tá ið tað snýr seg um næmingar við serligum tørvi.

– Ein bólkur hevur í fleiri ár arbeitt við at fáa skil á "grá-sonu" økinum. Tað hoyrist kortini einki um arbeiðið hjá hesum bólkinum, so hann arbeiðir ivaleyst ógvuliga gjølla, helt Hanus Joensen speiskliga fyri.

– Vit mugu hava trygd fyri dygd, men menningarætlanir at røkka hesum eru treytaðar av at gráa økið ikki longur verður litleyst.

### Liðiligari skipan

Hanus Joensen heldur, at talan má verða um liðiligari skipan enn nú, og at tað eigur at vera nógv lættari, enn tað er nú at gera royndir og nýskipanir, og at tað eisini viðvíkjandi starvsfólkum eigur at vera størri liðiligheit í skipanini:

– Vit hava í okkara skúla dømi um, at skipanin er alt ov lítið liðilig. Um ein lærari t.d. eisini er sosialráðgevi ella kanska sálarfrøðingur, so eigur lærarin at hava møguleika á sama arbeiðsplássi at røkja uppgávur bæði sum lærari og t.d. sum sálarfrøðingur. Lærarin kennir skúlan innanífrá, og tað er sjálvsagt fyrimunur at hava sovorðnan sálarfrøðing. Sjálvandi skal lærarin fyri tann partin av arbeiðstíðini, sum verður nýtt til sálarfrøðingaarbeiði, fáa ta lønina, sum hoyrir tí arbeiðinum til, men hetta hevur víst seg ikki at bera til, og tað er spell, sigur skúlastjórin í Kommunuskúlanum í Havn.

Henda greinin er frá fundinum í Miðlahúsinum týskvøldið, har Suðurstreymoyar Javnaðarfelag varpaði ljós á fólkaskúlan. Í blaðnum í gjár – mikudagsblaðnum – vóru tríggjar síður um evni. Pláss var ikki fyri hesi greinini tá, og tí verður hon prentað nú.

# Takið truplu næm

**Ingvald á Kamarinum er stjóri á einum serskúla fyri atferðartruplar næmingar í Danmark, og hann mælir til, at truplu næmingarnir skulu takast úr skúlanum, tí soleiðis høvdu bæði lærarar, vanligi næmingurin og trupli næmingurin fingið nógv meiri burtur úr. – Setið á stovn á stovn ein serskúla, ljóðar hansara ráð**

SKÚLI

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Fjordskolen liggur í Norðurjyllandi og er ein skúli fyri atferðartruplarnæmingar. Skúlastjórin har eitur Ingvald á Kamarinum, og hann hevur arbeitt við atferðartruplum børnum seinastu tíggju árini.

Hann hevði ikki ætlanir um at blanda seg í kjakið um fólkaskúlan í Føroyum, men eftir kjaktorgið, sum var í Miðlahúsinum týskvøldið, kennir hann á sær, at hann má siga sína hugsan. Tí ein spurningur, sum ofta varð havdur á lofti týskvøldið, var hvat gera vit við truplu næmingarnar. Hesir næmingar fella burtur ímillum, og enda í sokallaðum gráum økjum, har ein loysn er at hóma.

Men Ingvald á Kamarinum hevur eina sera einfalda, og sambært honum eisini góða loysn til henda trupulleika. Ein loysn, sum hevði givið atferðartruplu næmingunum nógv betri sømdir, og hevði givið Føroyum ein betri fólkaskúla.

– Takið truplu næmingarnar úr fólkaskúlanum. Teir skulu als ikki vera í skúla, er hansara greiði boðskapur.

– Tað sigur seg sjálvt, at ein flokkur við 24 næmingum, harav tveir hava atferðartrupulleikar, ikki riggar sum hann skal. Teir báðir truplu næmingarnir fara við nógvari orku, og so er lítið gott eftir til hinar 22 næmingarnar. Tá eru báðir næmingabólkarnir við sviðusoð, og tað er lærarin eisini, sum hevur brúkt allar sína orku til eina uppgávu, sum onki úrslit sæst av, sigur Ingvald á Kamarinum.

### Betri loysn fyri øll

Ingvald á Kamarinum mælir tí til, at seta á stovn ein serskúla í Føroyum. Ein skúla fyri atferðartruplar næmingar. Tað hevði loyst nógvar trupulleikar, sum føroyski fólkaskúlin í dag stríðist við.

– Næmingarnir, sum eftir eru í vanliga fólkaskúlanum, høvdu fingið meiri burtur úr, tí nú hevði lærarin meiri tíð til teir. Lærarin hevði eisini verið betri upplagdur, tí hann hevur størri yvirskot nú hann ikki skal brúka so nógva orku upp á truplu næmingarnar. Og teir truplu næmingarnir fáa nú eisini munandi meiri burtur úr, hava teir fingið eitt serligt tilboð har teirra tørvur verður nøktaður, vísir Ingvald á Kamarinum á.

Við øðrum orðum er